# Heimsins grønasta hotell

Tað var ikki hissini heiður, ið var Crowne Plaza Hotelli í Keypmannahavn fyri, tá tey á heysti í fjør fingu heiðurin "The World's greenest hotel". - Orsøkin til hetta er uttan iva hon, at vit hugsa grønt í hvørjum smáluti, sigur stjórin Allan L. Agerholm.

Vindmyllur, elbilar og biomassi er ikki bert tað, ið Danmark er vorðið kent fyri á umhvørvisøkinum tey seinnu árini.

Í oktober mánaði í fjør fekk Crowne Plaza Hotell heiðurin EcoTourism Award, og er hetta enn eitt tekin um, at Danmark framvegis er frammarlaga, tá tað ræður um grøna orku og grønan hugsunarhátt.

Tað var ein einmælt nevnd, ið vísti á hetta hotellið sum eitt hotell, ið gevur umhvørvinum ans og sum eitt fyridømi fyri onnur hotell.

– Tað er hørð kapping um ta viðurkenningina, sum liggur í EcoTourism-heiðurslønini, og hetta er eisini fyrstu ferð, at hesin heiðurin endar í Danmark, sigur stjórin á Crowne Plaza Hotell, Allan L. Agerholm.





Hann vísir á, at tá tað eydnaðist hansara hotelli at vinna henda heiðurin, so er orsøkin hon, at tey hugsa grønt allastaðni – frá smálutunum til teir størru lutirnar.

– At vit eisini fáa gestir okkara at hugsa umhvørvisvinarligt ger, at okkara grøna grundarlag, røkkur longur enn bert til sjálva upplivingina á hotellinum, sigur hann.

### Súkkla streym

At Crowne Plaza Hotell fekk henda heiðurin kom ikki eftir einari nátt. Frammanundan er eitt stórt arbeiði gjørt fyri at koma so langt.

Skipað er soleiðis fyri, at streymurin kemur frá fasaduni, her ein finnur størsta sólkyknu-anleggið í Norðureuropa. Grundvatnið verður brúkt til at køla og hita airconditonanleggið á hotellinum.

Umframt hetta koyra sjónvarpini og lampurnar við lágorku, og matstovan brúkar ta nýggjastu lágorkutøknina og bert lokalar rávørur.

Tað serstaka við hotellinum er eisini, at tey hava megnað at fáa gestirnar til at geva sítt íkast til umhvørvið, við at súkkla eina løtu á teimum streymframleiðandi súkklunum á hotellinum.

Her er skipanin hon, at allir geistir sum framleiða 10 watt-tímar, kunnu njóta eina ókeypis máltíð í norðurlendsku matstovuni á hotellinum.



**MITT Í**

*Crowne Plaza Hotell liggur mitt í Keypmannahavn, við stuttari frástøðu til alt tað sum danski høvuðsstaðurin hevur at bjóða*

## Golf-pakki

Hjá teimum ið elska at spæla golf, er Crowne Plaza Hotell eitt gott stað at búgva í.

Hotellið er einasta golf-resort í Keypmannahavn, og er bæði partnari og granni hjá einum av bestu golfvøllunum í Norðurlondum – Royal Golf Championship Course. Her ber til at fáa eina serstaka uppliving mitt í einum stórbýi, og her fáa gestirnir eisini eina VIP-tænastu bæði á vøllinum og uttanfyri vøllinum.

Hotellið bjóðar eisini ein serstakan golf-pakka við vølli, koyring, VIP-atgongd til members lounge og skiftirúm við spa og relax-fasilitetum.

Sambært heimasíðu teirra – www.cpcopenhagen.dk hava tey eitt tilboð uppá 875 kr. fyri hvønn um náttina í deluxe dupultkamari, morgunmati, greenfee fyri ein persón, umframt parkering í parkeringskjallara teirra.

## Fundast og fá ein IPad

Umframt at vera eitt framúr hotell við øllum hentleikum, hevur Crowne Plaza eisini eitt ótrúligt tilboð til gestir sínar: Møguleikan at fáa eina Apple IPad 2 sum gávu. Treytin fyri hesum er, at ein heldur fundir ella ráðstevnur sínar á hotellinum til eitt virði av 99.000 krónum. Tað vil so aftur siga, at ein fær bæði góðar umstøður og hentleikar á hotellinum, og so fær ein samstundis ein Ipad við 16 GB minni, WI-FI og 3G.

Ein onnur treyt í so máta er, at fundirnir verða hildnir áðrenn 31. desember í ár.

